# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Tað at hava nakað at síggja fram ímóti og gleða seg til er avgjørt nakað, sum øll hava gleði av*

*Hans Mourits Foldbo*

# Fyrimyndir fyri okkum øll

**Borgarstjórin í Gøtu er bæði errin og fegin um, at bygdirnar hava ítróttarfólk, ið gjørdu somikið nógv um seg á oyggjaleikum**

OYGGJALEIKIR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Mynd: Móttøku*
*Størsta hálið á oyggjaleikum gjørdu svimjararnir. Ikki minst Elspa Mørkøre, sum her sæst saman við Kára J. á Høvdanum*
*Mynd: Jonhard Hammer*

Elspa Mørkøre, Kári J. á Høvdanum, Áslakur R. Petersen og Karina Petersen vóru í miðdeplinum, tá Gøtu kommuna mánakvøldið hevði móttøku fyri sínum oyggjaleikahetjum.

Skipari fyri móttøkuni var borgarstjórin, Hans Mourits Foldbo, sum sjálvur hevur verið aktivur innan ítrótt. Og hann legði stóran dent á tann týdning, sum ítróttin hevur fyri persónligu menningina.

- Tað er ein sannroynd, at tað at fólk hava eitt aktivt frítíðarlív, er gagnligt í so nógvar mátar. Ikki minst er hetta sjónligt, tá fólk nema sær bókliga ella handaliga útbúgving, sigur Hans Mourits.

- Og persónliga er tað sjálvandi eisini mennandi, at tú hevur nakað at stremba eftir. Tað nýtist kanska ikki at vera á somikið høgum støði, sum tað er hjá hesum fýra, men tað at hava nakað at síggja fram ímóti og gleða seg til er avgjørt nakað, sum øll hava gleði av. Og í so máta eru hesi fýra ein sonn fyrimynd, heldur hann.

# Inga tapti móti Týsklandi

**Í einum tyngri vektflokki, enn hon vanliga berjist í, eydnaðist ikki Ingu Remmel at vinna seg víðari í EM-kappingini í judo**

JUDO
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

15 ára gamla Inga Remmel úr Havn, sum vann bronsu í judo á oyggjaleikunum á Rhodos í farnu viku, luttók um vikuskiftið í EM fyri gentur føddar í 1991-1992. Kappingin var á Malta og varð hon skipað sum ein cup-kapping, har vinnarin fór víðari og taparin reyk út. Tíverri tapti Inga sín fyrsta dyst móti eini gentu úr Týsklandi, og kom hon sostatt ikki víðari. Á Rhodos kappaðist Inga í vektflokkinum -48 kg, men á Malta kappaðist hon í –52 kg. Og ein tyngri vektflokkur enn vant hjálpti ikki havnardamuni.




*Inga Remmel varð í farnu viku fyrstu føroyska judokvinnan, sum vann heiðursmerki á oyggjaleikum*
*Mynd: Rólant*

# HB vil røkka finaluni

**FM-kappkoyringin er mest sum av fyri meistararnar, men enn er góður møguleiki at røkka finaluplássinum í steypakappingini**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

HB er at kalla fullmannað, tá teir klokkan 19 í kvøld spæla seinnu hálvfinaluna móti VB/Sumba í kappingini um Løgmanssteypið. Fyrra dystin vann HB 3-1, og tí standa teir við betru kortunum undan dystinum í dag.

Og kravið frá felagnum er púrasta greitt. Albert Ellefsen er nýggjur venjari hjá liðnum, og fremsta málið er at vinna sær sæti í steypafinaluni – og sjálvandi eisini vinna hana, kemur liðið hartil.

Til dystin hevur HB at kalla allar mans tøkar. Einasta ivamálið er Andrew av Fløtum, sum hevur verið sjúkur, men roknað verður tó við, at hann verður við í hópinum kortini. Tróndur Vatnhamar fekk ein lítlan snudd undir venjing mánakvøldið, men hann er heilt víst tøkur, verður sagt.

Hjá VB/Sumba eru allir mans tøkir. Hóast botnsessin í Formuladeildini, so hava avrikini verið støðugt betri seinastu umførini. Og tí er einki at ivast í, at teir vilja leggja seg eftir at vinna tey bæði málini aftur, sum vórðu tapt í Gundadali í fyrru hálvfinaluni.